TILTØK

Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Sunnudagin kl. 18 Møti – Gunnar Reynslág.

Sjómanskvinnuringurin í Havn
kemur saman á Sjómansheiminum mánakvøldið- 15. apríl kl. 20. Minst til pakkarnar.

Adventkirkjan
Leygardagin kl. 10 barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Dániel kap. 2 og 7, læra í profetii. Kl. 11 Gudstænasta, J. V. Danielsen.

Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 messa í Kerit.
Sunnudagin kl. 11 hámessa v/ Wladislaw Zdunek í Mariukirkjuni. Kl. 14 Sunnudagsskúli.

Frelsunarherurin, Tórshavn
Sunnudagin kl. 11 Møti, Toril Waag Olsen talar. Kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn. Kl. 18 Møti, Niels Edvard Olsen talar.
Mánadagin kl. 17 og 19 Skótamøti.

Meinigheitin í Hoyvík
Sunnudagin í Hoyvíkar skúla kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn og kl. 18 Møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti, Uppá Brekku 3.

Hebron, Argir
Sunnudagin kl. 10.30 Breyðbróting (skipað barnaansing). Kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Samkoman í Nebo á Toftum vitjar við sangi og talu.

Rhema á Hálsi
Týs- og mikukvøldið kl. 20.30 Bønartímin.
Fríggjakvøldið kl. 18–19.30: Atap Kids.
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og sunnudagsskúli.
Biblíuseminar við Friðtór Debes verður 16.–21. apríl. Tema: »Tú ert signaður fyri at verða til signing!« Kl. 19-19.45: Undirvising. Kaffistegður: Kl. 20.15-21.00: Undirvísing.

KFUM og KFUK í Havn
Sunnudagin kl. 15 í KFUK: Fundur við Louisu Niclasen (bert fyri limir)
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Almu Bjartalíð sigur frá um ferðina í Mali í Afrika.
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn.

Ebenezer
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Vitjan av Símun Ósá við familju, kl. 21 Útimøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

Meinigheitshúsið
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli. Sunnukvøldið kl. 18.00: Møti v/ Johnny Johannesen.
Mánakvøldið kl. 20.00: Manskórið venur.
Meinigheitslegan verður í Nesvík 12.-14. apríl, teknineinarlistin liggur frammí í húsinum inntil 10. apríl.

Filadelfia, Landavegur 22
Í kvøld kl. 20 Ungdómsmøti.
Í morgin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við Paula og Jastrid Høj, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18 Kvøldmøti við Regin við Skipá.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

Hvítusunnusamkoman
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

Samkoman Immanuel
Í kvøld kl. 20 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

Meinigheitshúsið á Skála
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli og kl. 19 Møti við Hera Eltør trb. og Bergur Debes Joensen. Streingjakórið og lovsongsbólkurin syngja. Hans K. Johannesen útsendur í tænastu hjá HM. Ársgávan til HM verður innsavnað. Aftná verður drekka og hugnalig samvera.

Keldan í Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús við Paula Høj.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Tinu og Max. Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

Aglow – Skálafjørður
Møti verður leygardagin kl. 15 í Stranda Centrum. Sanna Hammer luttekur. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

Nerija á Skála
Á møtinum sunnukvøldið kl. 18 tala Høgni Johannesen og Hallur Mortensen. Øll eru vælkomin.

Thabor, Fuglafjørður
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti og kl. 21 Ungdómsmøti.

Sundalagið
Sjómanskvinnuringarnir í Tjørnuvík, Vík, Hvalvík, Hósvík, Kollafirði, Oyri, Norðskála og á Eiði samlast í missiónshúsinum í Hvalvík týsdagin 16. apríl kl. 19.30. Sjómanstrúboðarin verður við. Allar kvinnur eru vælkomnar.

Lívsins Orð
Barnamøti verður fríggjadagin kl. 17.15.
Sunnudagin kl. 10.30 verður møti við breyðbróting.
Liljurnar møta mánadagin kl. 17 og ungdómsbólkurin kl. 20.

KFUM & K í Klaksvík
Opið hús fríggjakvøldið kl. 21.00, har Turid Brend og Inger Nørgaard frá Sudanmissiónini fara at greiða frá trúboðaraviríkseni á Mali. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Soli Deo Gloria
Mikukvøldið kl. 20.00: Kvinnurnar savnast.
Hóskvøldið kl. 20.00: Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 10.00: Bøn.
Leygarkvøldið kl. 20.30: Opið hús v/ Jens Lisberg og Jenis av Rana.

Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli.
Sunnudagin kl. 17.00: Møti v/ Jens og Jenis.
Mánakvøldið kl. 20.00: Bønarmøti.

Missiónshúsið í Skopun
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli.
Lovsangsmøti kl. 17.30 og møti kl. 18 eru avlýst vegna møti á Sandi.

Salem, Tvøroyri
Felagskvinnumøti verður í Skúlahøllini í Trongisvági leygardagin 20. apríl kl. 16.00. Allar kvinnur eru vælkomnar.

Aglow, Suðuroy
Møti verður leygarkvøldið kl. 20 í Café One Way. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Ungdómsmøti verður fríggjakvøldið kl. 21. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Einki møti verður sunnukvøldið vegna missiónsviku í Sumba.

Betel, Vágur
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur.
Mánadagin kl. 20 Bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 Uppbyggingarfundur.

Dagtilhaldið í Vági
Dagtilhaldið er opið týsdag og hósdag frá kl. 15.00-18.00. Øll eru vælkomin.

Dagtilhaldið Fløvin
heldur til í húsinum hjá Kongshavnar Kvinnufelag. Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 15.00-18.00. Allir pensionistar eru vælkomnir.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn
tlf. 319630/61655400.

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag kl. 10-18.
Týsdag-fríggjadag kl. 10-17.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Hósdagin 11. apríl
kl. 10.30-11 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Teldurát, Brandur Petersen
kl. 14-17 Domini binding
kl. 15-17 Tøvingarhugni í kjallaranum, Ása Hátún & Súsanna í Jákupsstovu
Fríggjadagin 12. apríl
kl. 10-15 Opið hús
kl. 15 Brot úr dagbókini hjá Rasmus Andreasen frá Árhusferðini 1909. Flemming Samuelsen.
Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Pensionistafelagið í Havn
Vit møtast nú aftur hvørt mikukvøld í Losjuni, Tinghúsvegur 18.

Felagið Tórshavn – gongutúrur
Sunnudagin 14. apríl verður gongutúrur til Kirkjuboar eftir Trælagøtuni við Jesmar Hansen. Byrjað verður við rulluportrið uppi á Hamrinum á Argjum kl. 14.00. Túrurin er miðalsverur. Havið heilt og góð gonguklæði og ein matpakka við. Tilmelding.

Náttarravnarnir í Tórshavn
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552.

AA-fundir í Havn
Reinsarið, Tórsgøta 5:
Fundur verður í kvøld frá kl. 20.00–21.00 og 22.30-23.30.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

AA-fundir í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

AA-Suðuroy
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 21.00 og sunnudag kl. 15.00.

Blái Krossur – Glyvrar
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

Blái Krossur – Eiði
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

Føroyahúsið í Keypmannahavn
Leygardagin 13. apríl kl. 15 verður barnamøti v/ Randi og Símun Hansen. Aftaná verður økeypis kaffi, te og køkur. Kl. 19.30 verður filmurin Left Behind sýndur. Økeypis atgongd. Uml. kl. 22.30 verður lovsongsløta. Kristnastova skipar fyri.
Sunnudagin 14. apríl kl. 17 verður evangel. familjumøti. Á skránni verður felagssangur, sangur, vitnisburðir, tala, søga til børnini v.m. Aftaná verður drekkamunnur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Føroya Heimavirkisfelag
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

LFÚ-skrivstovan
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 11 og 16.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

LISA
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin allar gerandisdagar frá kl. 9.00-12.00.
Telefon: 310197.
Teldupostadressa: lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

MÁF
(Meginfelag Áhugaleikara Føroya)
heldur til í húsum Hans Andrias Djurhuusar undir Pisuvarða 2, Tórshavn
Tlf. 315624, Faks 315924,
e-mail: maf@maf.fo
Heimasíða: www.maf.fo
Opið er: má. og tý. kl. 10-15, mi. kl. 13-18, hó. og fr. kl. 10-15.
Endamál felagsins er at stuðla áhugaleiklist og menna hesa mentunargrein í Føroyum. 16 sjónleikarafeløg eru limir í MÁF.
Formaður: Hilmar Joensen, Nólsoy. Dagl. leiðari: Malan Matras Joensen.

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

Amnesty International, Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Tlf. 315816
Heimasíðan: www.amnesty.fo
Teldupost:
Amnesty-Amnesty.fo
Skrivstovan er opin:
Mánadag frá kl. 13–17 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.

Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svoríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894. Fø.
Sparikassi 442027-8.

MBF
Íslandsvegur 10C
100 Tórshavn
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 9.00 og 16.00.
Tlf. 317373 · Fax 310813
T-post: mbf@post.olivant.fo

Giktafelag Føroya
Íslandsvegur 10 C
100 Tórshavn
Tlf. 310237 · Fax 310813
T-postur: gikt@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin týs- og hósdag frá kl. 11-14.
Fibromyalgibólkurin hevur opið mánadag frá kl. 11-13.

Lymfødemfelagið
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

Alzheimerfelagið
Tórsbyrgi 16
100 Tórshavn
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á tlf. 313102 og t-post:
sigmo@post.olivant.fo
Demenslinjan – er telefonráðgeving í øllum viðvíkjandi demens. Tlf. 313102 – svarar týsdag kl. 18.00-20.00.

Sinnisbati
Íslandsvegur 10 C,
100 Tórshavn
tlf. 322544 · Fax 310813
T-postur:
sinnbati@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin mikudag frá kl. 16.00-18.00. Fyrsta mikudag í mánaðinum er opið til kl. 19.30.
Tú ert vælkomin at ringja og spyrja um alt, sum hevur við sinnistrupulleikar at gera á tlf. 322544.

KONFIRMATIÓNIR

Konfirmantar í Glyvra kirkju sunnudagin 13. apríl 2002.

Karla Maria Gaardbo, Runavík
Linda Bjørk Herjálfsdóttir, Saltangará
Sonja Lamhauge í Hoyvík, Glyvrar
Dania Jensen, Saltangará
Lív Johannesen, Lamba
Aslaug Joensen, Saltangará
Lív Klein, Saltangará
Hildigunn Lamhauge, Lamba
Jacoba Langgaard, Søldarfjørður
Olivia Maria Langgaard, Saltangará
Joan Nielsen, Saltangará
Monika Weihe Poulsen, Runavík
Jenny á Reynatrøð, Runavík
Joan Simonsen, Saltangará
Súsanna Thomassen, Runavík
Barbara Sigrid Tórunnardóttir, Glyvrar
Magnus Thomar Bech, Søldarfjørður
Sámal Einarsson, Lamba
Johan Troest Davidsen, Saltangará
Magni Sigmarson Davidsen, Runavík
Beinir Eyðunsson Danielsen, Rituvík
Pætur Klein á Líknargøtu, Saltangará
Bjørn Jacobsen, Saltangará
Jón Hansen, Runavík
Per Hansen, Glyvrar
Einar Tróndargjógv Hansen, Saltangará
Bárður Hentze Lamhauge, Saltangará
Eyðfinn Poulsen, Lamba
Heri Olsen, Rituvík
Jógvan Juul Olsen, Rituvík
Jarvildur á Lava Olsen, Søldarfjørður

FILMSTEIGURIN

Panic Room

Har eru fýra veggir, ein telefonlinja uttan um vanligu telefonlinjuna til húsið, sjálvstøðug útluftingsskipan og ein rúgva av eftirlitsmonitorum, sum røkka í hvønn krók í húsinum. Alt er vart av stálhurðum, sum ikki slepst ígjøgnum. Soleiðis er eitt sokallað panikk rúm. Og tað er ikki fiktión, tí nógvir vælhavandi amerikanarar hava seinnu árini innrættað sær slík rúk fyri at kunn verja seg móti álopum og innbrotum.

Meg Altman, (Jodie Foster) er í ferð við at skiljast frá manninum, og tá tað er maður hennara, sum hevur funnið sær eina aðra, syrgir hon fyri, at hon og dóttur teirra Sarah (Kristen Stewart) fáa eitt nýtt stað at búgva.

Tær flyta inn í eitt spennandi, gamalt hús, sum ein steinríku einabúgvi hevur átt. Tað vísir seg, at hann hevur innrætta eitt serligt flýggingarrúm, sum hann kundi goyma seg í, um onkur breyt inn í húsið at stjala ríkidømi hansara. Rúmið er tryggjað eftir øllum kunstins reglum við kanningartólum, mati, serligum telefonlinjum o. s. fr. Meg heldur, at tað er eitt sindur óhugnaligt, tí hon líðir av klaustrofobi, men dóttir hennara heldur tað vera alle tiders.

Fyrstu náttina, sum tær eru í nýggja húsinum, bróta tríggir skumlir fýrar inn. Burnham (Forrest Whitaker), Raoul (Dwight Yoakam) og Junior (Jared Leto) hildu, at húsið stóð tómt, og teir høvdu lagt ætlanir um at gera eitt skjótt innbrot og tryggja sær tær milliónirnar, sum tann gamli ríkmaðurin hevur goymt í húsinum. Meg vaknar og leggur til merkis teir, og so skunda hon og Sarah sær í flýggingarrúmið. Tíverri er tað, sum um brotsmenninir leita júst í tað rúmið. Og so byrja ein langt og nervapirrandi herseting. Rúmið er tryggjað við sterkum, tjúkkum stálveggum, so brotsmenninir sleppa ikki inn. Men sleppa Meg og Sarah útaftur? Telefonin virkar ikki. Og Sarah hevur sukursjúku, so…



Frumsýning
Fríggjadagin 12.04. kl. 21[15] Fríggjadagin 12.04. kl. 23[30]
Leygardagin 13.04. kl. 21[15] Leygardagin 13.04. kl. 23[30]
Sunnudagin 14.04. kl. 20[15] Sunnudagin 14.04. kl. 22[30]

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu

HAVNAR BIO
Tlf. 3119 56

Fríggjadagin 12.04. kl. 23[00] Leygardagin 13.04. kl. 23[00]
Sunnudagin 14.04. kl. 22[15]

Fríggjadagin 12.04. kl. 20[45] Leygardagin 13.04. kl. 20[45]
Sunnudagin 14.04. kl. 20[00]

Fríggjadagin 12.04. kl. 18[30] Leygardagin 13.04. kl. 18[30]
Sunnudagin 14.04. kl. 18[00]

Fríggjadagin 12.04. kl. 18[15] Leygardagin 13.04. kl. 18[15]
Sunnudagin 14.04. kl. 17[30]